# Fyrstu húsini eru í gerð

**Vestmanna:** Nýggja útstykkingin Uppi í Vestri hjá Vestmanna kommunu er liðug, og nú ber til hjá fólki at ogna sær grundøki á hesum staði.

Íalt vóru 25 grundøki tøk, men fleiri teirra eru longu seld. Haraftrat ery tey fyrstu húsini í gerð, og verða ætlandi sett upp fyrsta dagin. Stykkini eru 600 fermetrar stór og liggur kostnaðurin um 200.000 kr. fyri hvørt teirra.

Tá kommunan á sinni avgjørdi at fyrireika hesa útstykkingina, sum hevur kostað góðar 10 mió. kr., lá hópurin av umsóknum um byggiloyvi inni. Men síðani hava nøkur fólk valt aðrar loysnir, m.a. við at keypa sær hús í bygdini ístaðin.

- Kortini tykist áhugin fyri hesum grundøkjunum at vera stórur, nú tey eru vorðin byggibúgvin, verður sagt av kommunuskrivstovuni í Vestmanna.

Tætt við hesa nýggju útstykkingina liggur bæði barnagarður og útibarnagarður, umframt tað at ein hevur sera gott útsýni yvir bygdina.

**sb.**



*Sera gott útsýni er av nýggju útstykkingini Uppi í Vestri og oman yvir Vestmanna bygd*

# Betri umstøður til ferðavinnuna

**Vestmanna:** Eitt av tí, sum vestmenningar eru vorðnir kendir fyri, eru teir vælumtóktu túrarnir undir Vestmannabjørgini. Hetta hevur verið eitt sera væl umtókt ferðamál hjá føroyingum eins væl og útlendingum, sum her hava kunnað frætt seg um tey vøkru fuglabjørgini norðanvert Vestmanna.

Tað eru tvey feløg í bygdini sum hava tikið sær av hesum flutningi, og hjá teimum er eisini týdningarmikið at umstøðurnar hjá teim ferðandi eru av teimum bestu.

Bæði feløgini – Skúvadal og Sea Service – hava tí havt ætlanir um at betra um umstøðurnar. Tey hava tí sett fram uppskot um ymiskar ætlanir hesum viðvíkjandi til kommununa at taka støðu til.

Á fundi í bygdarráðnum herfyri varð samtykt, at geva feløgum betri umstøður at virka undir, kortini við ávísum treytum.

### Treytir

"Sea Service" hevur ætlanir um at fáa teir tríggjar bátarnar hjá felagnum lagdar uttanfyri havnarskrivstovuna, eins og ein ætlar at reka ferðavinnuvirksemi á hesum staði.

Felagið eigur í løtuni bátarnar Silju og Fríðgerð, men letur í løtuni byggja ein nýggjan bát til flutning av ferðafólkum.

Á fundinum í bygdarráðnum varð samtykt at ganga umsóknini frá felagnum á møti. Kortini skuldi felagið lúka ymiskar treytir.

Tá hetta uppskotið var til viðgerðar í bygdarráðnum varð tað samtykt við seks atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fólkini aftanfyri Skúvadal hava eisini ætlanir um at betra um umstøðurnar hjá ferðavinnuni í Vestmanna.

Felagið hevur lagt uppskot fyri bygdarráðið um loyvi at leggja eina bátabrúgv uttanfyri bátahylin, við tað økið har ein ferðavinnubygningur í løtuni stendur í gerð.

Eins og í hinum felagnum er henda loysnin bert ein fyribils loysn, sum verður galdandi hetta árið út.

Hetta uppskotið varð einmælt samtykt.

**sb.**

Bowlinghøllin á Hálsi:

# 4 banar afturat og matstovu

**– Í løtuni bíða vit bert eftir, at Damfar flytir út, og so fara vit at byrja at byggja um og út, sigur Bjarni Kyster, ið eigur og rekur bowlinghøllina á Hálsi**



*So skjótt sum hann sleppur framat fyri Damfar, fer Bjarni Kyster at buggja út. 4 bowlingbanar skulu gerast afturat, umframt matsovu og rúm við stórskíggja til fótbólt*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

ÚTBYGGING
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Leingi hevur slaturin gingið, um at ein av vælkendu »Jensens Bøfhus« matstovunum, skuldi lata upp í Føroyum. Og hon skuldi vera í bygninginum, har Bowlinghøllin eisini heldur til.

Men tann ætlanin er nú kortini vorðin til einkis. Bjarni Kyster, sum var maðurin aftanfyri »Jensens Bøfhus« matstovuætlanina, sigur, at nærum alt var komið upp á pláss, men teir vóru tó ikki heilt samdir á øllum økjum. M.a. vildi Bjarni Kyster nýta føroysku útvegararnar av kjøti, meðan matstovuketan helt uppá, at allar rávørur skuldu útvegast ígjøgnum tey.

Hvørgin vildi geva seg, og so fór tann ætlanin í vaski. Men Bjarni Kyster er tó ikki ráðaleysur.

### 4 banar og matstovu

– So skjótt sum Damfar fer út úr bygninginum byrja vit at byggja út. Bowlinghøllin skal víðkast, og vit skulu hava fýra bowlingbanar afturat. Harumframt fara vit eisini at gera aðrar umbyggingar, sigur Bjarni Kyster.

Millum annað nevnir hann, at matstovuætlanin ikki er slept, hóast hann ikki fekk semju í lag við »Jensen Bøfhus«. Í staðin verður ein líknandi matstova gjørd.

– Ætlanin er at hava eina matstovu, sum hevur eitt ógvuliga líknandi konsept, sum »Jensens Bøfhus« hevur. Tað verður ein búffmatstova við umleið somu príslegu, og úrvali av mati verður eisini nakað tað sama, sum tað er í »Jensens Bøfhus«, greiðir Bjarni Kyster frá.

Hann sigur, at tað ikki verður nøkur onnur matstovuketa í staðin, men at teir fara at gera sítt egna. Við føroyskum veitarum.

– Tað verður ein øðrvísi matstova. Ikki tað traditionella, greiðir Bjarni frá.

### Bíða eftir Damfar

Bjarni sigur seg enn ikki vita júst nær ætlanin er at hava alt klárt og liðugt. Av tí, at byggjast skal út inn í hølini, har Damfar nú heldur til, er neyðugt at bíða, til teir eru farnir út. Men Bjarni sigur seg vænta, at tá arbeiðið loksins fer í gongd, verða tað einir tríggir mánaðir til alt stendur klárt til nýtlsu.

– Vit ætla at hava mangt ymiskt, ikki bert eina matstovu og bowling. M.a. verður eitt rúm við stórskíggja, har møguligt verður at sita og hyggja eftir fótbólti. Tað er torført at greiða frá øllum ætlanunum umvegis telefonina, men tað verða í øllum førum nógv sitipláss, og nógv ymisk tilboð, staðfestir Bjarni Kyster at enda.

# Sjáldsom skúlakonsert við stjørnuskotum

**Trongisvágur:** Tað er ikki á hvørjum degi at skúlanæmingar fáa høvið at fara á eina konsert í skúlatíð.

Men henda møguleikan fáa næmingar í Suðuroynni kortini fyrrapartin í dag, tá ungdómskórið "Ung Stjørnuskot" fer at hava konsert í ítróttarhøllini í Trongisvági fyri einum stórum parti av skúlanæmingunum í oynni.

Tey vænta sær eina serstaka konsert, tí bæði áhoyrarar og sangarar eru á sama aldri. Og eisini tí, at fyri næmingarnar man tað kennast hugaligt at sleppa vanliga skúladegnum eina løtu, og so fara á eina forvitnisliga konsert.

Kórið hevur havt fleiri konsertir í Føroyum og uttanlands, men fer ikki fyrrenn nú at hava konsertir í Suðuroynni. Konsertin verður sum eitt slag av upphiting til Prix Føroyar, tí tey sleppa at nýta bæði teknikkarar og ljóðútgerðina, sum skal standa sína roynd til kappingina leygarkvøldið. Á konsertini hjá ungdómskórinum úr Havn fer eisini bólkurin Paradox at spæla.

Ung Stjørnuskot er eitt kór undir Kvøldskúlanum og Musikkskúlanum í Havn, og telur 26 fólk í aldrinum 13 til 19 ár. Leiðari í kórinum er Sigrið Sivertsen.

**sb.**

# Spennandi seinnapartur fyri alla familjuna

**Argir:** Leygardagin fer 6. B flokkur við Argja skúla at skipa fyri einum spennandi familjudegi.

Ætlanin hjá flokkinum er at fara á seturskúla í Danmark í mai mánaði, og til hetta krevst sjálvandi peningur. Og tað er m.a. til hetta, at tiltakið við skúlan verður fyriskipað. Ætlanin er sjálvandi eisini at geva fólki møguleika at koma saman til eina hugnaliga løtu.

Á skránni henda seinnapartin verður m.a. ponyríðing, køkutombola, loppumarknaður og fiskibrunnur. Byrjað verður kl. 11 og verður síðani hildið á til út á seinnapartin.

Ætlanin er at hava seturskúlan á einum frítíðarsentri í Norðurjyllandi, har møguleikar eru til nakrar dagar, bæði í gaman og álvara.

**sb.**